FRÁ MIÐVÁGS KOMMUNU

# ARBEIÐSFORMAÐUR

Søkt verður eftir a**vloysara fyri arbeiðsformann í farloyvi**, at byrja sum skjótast. Starvið er tíðaravmarkað til 6 mánaðir.

**Arbeiðsøkið hjá formanninum er:**
- At leiða alt tað dagliga útiarbeiðið hjá kommununi so sum viðlíkahald av vegum, vatnleiðingum, kloakkum og annars øllum ognum kommununar, sum umsjónarmaðurin ikki hevur ábyrgdina av.
- At skipa fyri smærri nýgerðum.
- At ráðgeva í tekniskum málum, tá tørvur er á tí.

**Vit vænta, at tú:**
- Hevur koyrikort.
- Dugir væl at samstarva við onnur.
- Hevur arbeiðs- og leiðsluroyndir.
- Ert røkin og dugir væl at arbeiða sjálvstøðugt.

**Setanarviðurskifti:**
Starvið er fulltíðarstarv.
Lønar- og setanarviðurskifti verða sambært sáttmála millumk KAF og avvarandi yrkisfelag.

Skrivlig umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal sendast til **Miðvágs kommunu, Jatnavegi 2, 370 Miðvági.**

Umsóknirnar skulu merkjast: "Arbeiðsformaður".

Miðvágs bygdaráð skilar sær rætt til at velja ímillum umsøkjararnar, ella ongan at seta.

Meira fæst at vita um starvið, við at venda sær til borgarstjóran á tlf. 221429, arbeiðsformannin á tlf. 282329 ella kommunuskrivstovuna á tlf. 332429.

Umsóknir skulu verða
**Miðvágs bygdaráð**

í hendi seinast **mikudagin 25. septembur 2007 kl. 1500.**

**Miðvágs kommuna**

LMS

# Størv í Landsmiðstøðini

### Bókavørður

Eitt starv sum bókavørður er leyst at seta frá 1. november 2007 ella skjótast til ber.

Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um vanligt bókavarðaarbeiði, eitt nú skráseting, røkt, avgreiðslu og ráðgeving.

Starvið fevnir eisini um aðrar *ikki-bókavarðauppgávur* sum bókhald og avgreiðslu um FSL-skipanina.

Landsmiðstøðin nýtir bókasavnsskipanina Aleph/eLib-booking, og hevur bókavørðurin saman við KT-vørðinum ábyrgd av samskiftinum við veitaran av skipanini.

Vit sóknast eftir fólki, sum hevur
- útbúgving sum bókavørður
- royndir við bókasavnsarbeiði
- royndir og/ella áhuga fyri bókhaldi og at nýta FSL-skipanina
- førleika og áhuga í at nýta teldu í arbeiðinum, og sum kennir til Aleph ella aðra líknandi bókasavnsskipan og hevur
- hollan kunnleika í føroyskum.

### Skrivstovufólk

Eitt starv sum skrivstovufólk er leyst at seta frá 1. november 2007 ella skjótast til ber.

Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um móttøku og avgreiðslu av viðskiftafólki, útlán av undirvísingarmiðlum, røkt av bókasøvnum og ymiskt praktiskt arbeiði í sambandi við skeiðsvirksemi.

Landsmiðstøðin nýtir bókasavnsskipaninar Aleph og eLib-booking.

Vit sóknast eftir fólki, sum hevur
- skrivstovuútbúgving/skrivstovuroyndir
- viðkomandi arbeiðsroyndir, eitt nú frá bókasavni
- førleika og áhuga í at nýta teldu í arbeiðinum
- kunnleika til Aleph ella aðra líknandi bókasavnsskipan og hevur
- hollan kunnleika í føroyskum.

**Felags fyri bæði størvini**

Lýkur tú øll ella flestu førleikakrøvini omanfyri, dámar tær at arbeiða sjálvstøðugt, ert tú røkin, ert tú tænastuhugað/-ur, hevur tú góð samstarvsevni og hevur tú lætt við at samskifta við fólk, er tað helst tær, vit hava brúk fyri.

Vit kunnu bjóða eitt fjølbroytt og sjálvstøðugt starv í einum stovni, sum hevur samskifti við flestu skúlar og lærarar í landinum, og sum hevur tætt samstarv við eitt nú Mentamálaráðið, Landsbókasavnið og Føroya Gjaldstovu.

Talan er um størv í fulla tíð. Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Umsóknir við upplýsingum um útbúgving, starvsroyndir v.m. skulu vera Landsmiðstøðini í hendi í seinasta lagi mánadagin 8. oktober 2007.

**Umsókn**

Umsókn við prógvum, c.v., o.ø. skulu sendast til:
**Landsmiðstøðin**
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3084
FO-110 Tórshavn
ella t-post: lms@lms.fo

Umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi **mánadagin 8. oktober 2007**.

Gjøllari upplýsingar fáast við at venda sær til Petur Simonsen, stjóra í Landsmiðstøðini, tlf. 356850 ella 220414.

**www.lms.fo** **Landsmiðstøðin**

**Landsmiðstøðin** er stovnur undir Mentamálaráðnum, sum veitir tænastur í undirvísingarverkinum. Landsmiðstøðin sýnir fram og lænir út undirvísingarmiðlar, veitir fakliga og námsliga ráðgeving, skipar fyri eftirútbúgving av lærarum og hevur námsligan verkstað.

# DVEYLAN

## Alt innan reingerð



Ring á tlf. 214175

temp-team

VAL AV STARVSFÓLKI & VIKARUM



## Kom og skráset teg

Kundi tú hugsað tær at arbeitt sum vikarur? Ella komið í eitt fast starv?

Vilt tú verða fleksibul og ráða yvir tíðini sjálv/ur?

Vit hava eisini brúk fyri pensionistum og lesandi.

Vit røkka um alt landið.

TEMP-TEAM er eitt vikarbureau.

TEMP-TEAM Føroyar er ein partur av fleiri deildum runt um í Europa og úti í heimi.

Okkara uppgáva er at finna starvsfólk, ið kunnu arbeiða sum vikarar og tey sum vilja koma í eitt fast starv, bæði á sjógvi og landi.

Far inn á heimasíðu okkara **www.temp-team.fo**

TEMP-TEAM, Niels Finsensgøta 37, FO-100 Tórshavn **Tel.: +298 61 61 00**




*Gravarhjálp*

Marknagilsvegur 86
100 Tórshavn

*Tel 311723 - 511723 · Fax 321722*
*www.gravarhjalp.net*

Sosialurin 341800

# Lesið Sosialin - so eru tit við